# Sparikassin 150 mió. kr. í ábyrgdarpeningi

Føroyskir og útlendskir íleggjarar hava sett 150 mió. kr. av ábyrgdarpeningi í Føroya Sparikassa. Ansvarligi kapitalurin er fingin til vega umvegis eina lánsbrævarøð, sum verður skrásett bæði á Københavns Fondsbørs og á VMF marknaðinum á ICEX.

Føroyskir og útlendskir íleggjarar hava sett tilsamans 150 mió. kr. av ábyrgdarpeningi í Føroya Sparikassa. Hesin telur við ájavnt við eginpening, tá peningastovnar rokna solvens.

– Lánsbrævaútgávan er ein liður í at optimera okkara kapitalsamansetting. Ábyrgdarpeningur er bíligari enn partapeningur og gevur okkum soleiðis møguleika fyri at renta partapeningin betri. Hækkaði solvensurin, sum lánsbrævaútgávan ber í sær, skal brúkast aktivt í okkara virksemi, sum er nógv merkt av vøkstri og menning, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa.

Ábyrgdarpeningurin er fingin til vega umvegis eina lánsbrævarøð, har fasta rentan er 5,385 prosent p.a. tey fyrstu fimm árini. Lánsbrøvini ganga formliga út í 2014.

Sparikassin hevur í morgun boðað Københavns Fondsbørs frá skrásetingini, ið verður framd ímorgin. Lánsbrævið verður hartil seinni skrásett á VMF marknaðinum á ICEX, ið er íslendski virðisbrævamarknaðurin.

-árni


Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo

# Ólavsøkugudstænasta á Christianshavn

**Ólavssøkugudstænastan í Keypmannahavn verður í ár hildin í Christians Kirke í Strandgade á Christianshavn, ólavssøkudag kl. 14:00**

ÓLAVSØKA
*tíðindaskriv*



*Sjálv Christianskirkjan er serstaklia vøkur. Mest sum eina vitjan verd í sjálvum sær*

Síðani ólavssøkuhaldið í Keypmannahavn flutti út á Norðuratlantsbryggjuna, hevur guðstanastan verið hildin í Vor Frelsers Kirke, við tí eyðkenda sprírinum. Hendan kirkjan er nú stongd orsaka av eini størri umvæling.

Christianskirkjan, liggur eisini høgliga í samband við ólavssøkuhaldið á Norðuratlantsbryggjuni – fyri tey ið eru toliliga til beins, tekur tað eini 8 – 10 minuttir at ganga til Føroysku Viðskiftastovuna, og Norðuratlantsbryggjuna.

Prædikantur í ár er Bergur Jacobsen. Stamen Stantchev situr á urgubríkini, og tey bæði Anna Maria Olsen og Agnar Lamhauge solistar. Anna Maria fer at bera fram onkran fosturlandssang, ið hóskar til løtuna, og Agnar fer at gleða kirkjufólkið við sínum serliga sniði av kingosangi – sum siður er, endar guðstænastan við at kirkjufólkið reisir seg og syngur tjóðsangin.

Christians Kirken var upprunaliga útisetakirkja hjá týskinum í Dammark. Kirkjan stóð í gerð frá 1754 – 1759, og bar í fyrstani heitið Frederiks Kirke. Síðani 1901 hevur hon verið donsk sóknarkirkja, og er eitt eyðkennt dømið um tær protestantisku "prædikukirkjurnar", har prædikustólurin er beint yvir altarinum, fyri at peika á týdningin av prædikjaða orðinum. Kirkjan í sær sjálvum er ein vitjan verd!

